# Frágreiðing frá Barnaverndastovu Føroya 2012
## - grundað á hagtøl frá barnaverndartænastunum og Fosturforeldraskipanini

## Innihald

1. UPPBÝTI Í BARNAVERNDARTÆNASTUR ............ 2

2. HVUSSU BYRJA BARNAVERNDARMÁLINI ............ 6

3. FÍGGING – KOSTNAÐUR AV BARNAVERND ............ 11

4. FOSTURFORELDRASKIPANIN ............ 16

6. MANNAGONGD OG BAKGRUND ............ 20

# 1. Uppbýti í Barnaverndartænastur

Barnaverndarlógin ásetur, at landið skal skipast í barnaverndarøkir við í minsta lagi 1500 íbúgvum í hvørjum øki. Orsøkin til, at barnaverndarlógin álegði smærri kommunum at samstarva í barnverndarmálum er, at talan er um trupul og viðkvom mál.

Áðrenn barnaverndarlógin kom í gildi 1. januar 2006, vóru trupulleikar við ógegni og rættartrygd, sum var umráðandi at fáa loyst, og mett var, at størri eindir við skikkaðum fólki í umsitingini var gongda leiðin.

Føroyar eru býttar upp í 10 barnaverndarøki ella **barnverndartænastur,** sum er felagsheiti fyri barnaverndarnevnd og barnaverndarumsiting.

**Talva 1: Uppbýti í barnaverndartænastur**

| Barnaverndarøki | Kommunur |
|---|---|
| Barnaverndartænastan í Tórshavn | Tórshavnar |
| Barnaverndartænastan við Skálafjørðin | Nes<br>Runavíkar<br>Sjóvar |
| Barnaverndartænastan í Norðoyggjum | Fugloyar<br>Klaksvíkar<br>Kunoyar<br>Viðareiðis<br>Hvannasunds<br>Húsa |
| Barnaverndartænastan í Sandavági | Kvívíkar<br>Vestmanna<br>Vága<br>Sørvágs |
| Barnaverndartænastan í Sunda kommunu | Eiðis<br>Sunda |
| Suðuroyar barnaverndartænasta | Hvalbiar<br>Tvøroyrar<br>Fámjins<br>Hovs<br>Sumbiar |
| Barnaverndartænastan í Eysturkommunu | Eysturkommuna |
| Suðuroyar sunnara barnaverndartænasta | Porkeris<br>Vágs |
| Barnaverndartænastan í Fuglafirði | Fuglafjarðar |
| Sandoyar barnaverndartænasta | Skopunar<br>Sands<br>Skálavíkar<br>Húsavíkar<br>Skúvoyar |




Í Føroyum vóru við árslok 2012, skrásett 846 barnaverndarmál í hagtalsskipanini hjá Barnaverndarstovu Føroya.

Barnaverndarmál eru sera ymisk, og munur er á, hvussu arbeiðskrevjandi einstøku barnaverndarmálini eru. Málini kunnu snúgva seg um einfalda ráðgeving, men eisini um børn, sum verða sett heiman móti viljanum hjá foreldunum, sokallað umsorganaryvirtøka uttan samtykki. Tí ber illa til at samanbera støðuna í einstøku barnaverndartænastunum, tí talið eitt einstakt ár í sjálvum sær, sigur ikki so nógv um støðuna. Við tíðini vilja hagtølini kunnu vísa okkum, um talið av barnaverndarmálum broytist, og um fyrsiskipanirnar, barnaverndartænasturnar seta í verk, tæna endamálinum.

Hagtalsskrásetingin er skipað soleiðis, at hvørt barnið sær er skrásett sum eitt mál. Hetta merkir, at ein familja kann verða skrásett sum fleiri barnaverndarmál í skipanini, um stuðul verður veittur fleiri børnum í somu familju.

**Talva 2: Tal av barnaverndarmálum, 31.12.2012**

| | Barnaverndarøki | Gentur | Dreingir | Íalt | Børn 0-21 ár í økinum | Mál í % av barnatali |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | BVT, Tórshavn | 166 | 177 | 343 | 6.265 | 5,5 |
| 2 | BVT, Norðoyggjar | 49 | 59 | 108 | 1.666 | 6,5 |
| 3 | BVT, Skálafjørðurin | 47 | 41 | 88 | 1.816 | 4,8 |
| 4 | BVT, Fuglafjørður | 13 | 19 | 32 | 444 | 7,2 |
| 5 | BVT, Sunda kommuna | 20 | 25 | 45 | 782 | 5,8 |
| 6 | BVT, Sandavágur | 54 | 36 | 90 | 1.462 | 6,2 |
| 7 | BVT, Sandoy | 7 | 12 | 19 | 353 | 5,4 |
| 8 | BVT, Suðuroy | 22 | 33 | 55 | 790 | 7,0 |
| 9 | BVT, Eysturkommuna | 16 | 22 | 38 | 628 | 6,1 |
| 10 | BVT, Suðuroyar sunnara | 13 | 15 | 28 | 469 | 6,0 |
| **Alt landið** | | **407** | **439** | **846** | **14.675** | **5,8** |

Talvan vísir, at mál í % av barnatalinum er 5,8 fyri alt landið. Størsta økið, Tórshavn, liggur við 5,5% beint undir samlaða talinum fyri alt landið. Av teimum størru økjunum annars, hava Norðoyggjar (6,5%) og Sandavágs økið (6,2%) nakað fleiri mál í mun til barnatalið enn landstalið, meðan Skálafjarðar økið (4,8%) hevur nakað færri mál í mun til barnatalið enn landstalið. Til tey størri økini verða her roknað tey øki, sum hava fleiri enn 1000 børn.

Í teimum smærru økjunum, sum hava færri enn 1000 børn, hava Fuglafjarðar BVT (7,2%), BVT Suðuroy (7,0%), BVT í Eysturkommunu og Suðuroyar sunnara BVT fleiri barnaverndarmál í mun til barnatalið enn landið sum heild. Sandoyar barnaverndartænasta hevur færri mál í mun til landið sum heild, meðan Sunda Kommuna liggur á hædd við talið fyri alt landið.

**Talva 3: Tal av barnaverndarmálum í % av barnatali við árslok 2010-2012**

| Barnaverndarøki | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|
| BVT, Tórshavn | 4,3 | 4,8 | 5,5 |
| BVT, Norðoyggjar | 5,2 | 5,0 | 6,5 |
| BVT, Skálafjørðurin | 3,8 | 4,3 | 4,8 |
| BVT, Fuglafjørður | 4,7 | 6,7 | 7,2 |
| BVT, Sunda kommuna | 5,1 | 5,0 | 5,8 |
| BVT, Sandavágur | 2,8 | 3,8 | 6,2 |
| BVT, Sandoy | 7,6 | 8,6 | 5,4 |
| BVT, Suðuroy | 6,2 | 4,9 | 7,0 |
| BVT, Eysturkommuna | 3,2 | 4,5 | 6,1 |
| BVT, Suðuroyar sunnara | 5,6 | 5,7 | 6,0 |
| **Alt landið** | **4,4** | **4,8** | **5,8** |

Seinastu trý árini tykist gongdin vera, at talið av barnaverndarmálum í mun til samlaða barnatalið er hækkandi, bæði fyri landið sum heild og í flestu økjunum.

**Talva 4: Tal av barnaverndarmálum býtt á aldur og kyn, 31.12.2012**

| Aldur | Gentur | Dreingir | Íalt | Børn 0-21 | Mál í % av barnatali |
|---|---|---|---|---|---|
| 0-6 | 78 | 108 | 186 | 4.608 | 4,0 |
| 7-13 | 170 | 191 | 361 | 5.025 | 7,2 |
| 14-18 | 137 | 121 | 258 | 3.578 | 7,2 |
| 19-21 | 22 | 19 | 41 | 1.500 | 2,7 |
| **Alt landið** | **407** | **439** | **846** | **14.711** | **5,8** |

Á talvuni omanfyri sæst, at talið á barnaverndarmálum í mun til barnatalið í landinum hækkar tess eldri børnini eru. Soleiðis eru lutfalsliga flest mál (7,2%), í aldursbólkunum 7 - 13 og 14 - 18 ár, meðan færri mál (4,0%) eru í eru í aldursbólkinum 0 - 6 ár. Fæst mál (2,7%) eru í aldursbólkinum 19 - 21 ár.

Sambært barnaverndarlógini, eru børn fevnd av lógini til tey fylla 18 ár. Fyriskipanir kunnu tó í serligum førum halda fram eftir, at barnið er fylt 18.

1. juli 2012 varð barnaverndarlógin broytt soleiðis, at fyriskipanir, ið settar eru í verk, innan barnið hevur fylt 18 ár, kunnu halda áfram til barnið er 23 ár. Áðrenn barnaverndarlógin varð broytt, var markið 21 ár. Hædd hevur ikki verið tikið fyri hesum í 2012, men verður tikið við í hagtalsfrágreiðingini komandi ár.

## 2. Hvussu byrja barnaverndarmálini

Barnaverndarlógin fevnir sambært lógarviðmerkingunum bert um børn, ið liva undir viðurskiftum, sum kunnu skaða teirra heilsu og menning.

Við barnaverndarlógini ynskti lóggevarin, at barnaverndartænasturnar skuldu fáa møguleika at savna sína orku, um tey børn í samfelagnum, sum hava tørv á stuðli og hjálp. Tí fevnir barnaverndarlógin ikki um trivnaðin hjá børnum yvirhøvur, og fevnir heldur ikki um brekað børn uttan so, at tey liva undir umstøðum, sum kunnu skaða teirra heilsu og menning.

Fyri at tryggja, at barnaverndartænasturnar fáa kunnleika um børn, sum liva undir viðurskiftum, ið ikki eru nøktandi, er fráboðanarskylda ásett í barnaverndarlógini.

Lógin sigur, at øll hava fráboðanarskyldu, men skilur tó ímillum vanliga borgaran, ið kann vera ónavngivin, og tann, sum í starvi sínum hevur við børn at gera. I seinna førinum er kravið, at fráboðanin skal verða navngivin Í 2012 varð barnaverndarlógin endurskoðað, sum viðførdi, at fráboðanarskyldan hjá fakfólki, frá 1. juli 2012 varð skerpað. Fakfólk hava skyldu til at fráboða barnaverndartænastuni, um so er, at tey hava kunnleika til ella orsøk til at halda, at viðurskifti eru, sum krevja, at komið verður uppí eftir lógini.

Ásett er nú eisini, at barnaverndartænastan skal boða fráboðara frá hvørt fráboðanin er móttikin.

Fráboðanarskyldan í Barnverndarlógini:

> *§ 14. Øll, sum í starvi sínum hava við børn at gera, og sum í hesum sambandi fáa kunnleika til viðurskifti, sum krevja, at komið verður uppí eftir hesi lóg, hava skyldu til navngivin at boða barnaverndartænastuni frá hesum. Fráboðanarskyldan sambært hesum stykki verður sett fram um ásetingarnar í øðrum lógum um tagnarskyldu í viðkomandi yrkjum.*
>
> *Stk. 2. Tann, ið fær kunnleika til, at foreldur ella annar uppalari t.d. misrøkir, meinslar, misnýtir ella handfer barn soleiðis, at álvarsamur vandi er fyri tess sálarligu ella likamligu heilsu ella búning, hevur skyldu at boða avvarðandi barnaverndartænastu frá hesum. Fráboðarin kann vera ónavngivin.*
>
> *Stk. 3. Fráboðast skal eisini viðvíkjandi kvinnum, ið eru við barn, tá ið mett verður, at tørvur er á stuðli sambært hesi lóg, t.d. vegna álvarsama rúsevnismisnýtslu, sálarsjúku ella sálartrupulleikar.*
>
> *Stk. 4. Barnaverndartænastan skal sum skjótast, og seinast innan eina viku, ganga ígjøgnum innkomnar fráboðanir og meta um, hvørt kanningar skulu setast í verk sambært hesi lóg, sí §§ 45 og 49.*

Ein fráboðan sambært hesi grein merkir ikki, at barnaverndartænastan hevur skyldu at seta fyriskipanir í verk. Barnaverndartænastan hevur bert skyldu at kanna og upplýsa málið, og um komið verður fram til, at tað ikki er grundarlag fyri at seta fyriskipanir í verk, skal barnaverndartænastan onki gera.

**Talva 5: Nýggj barnaverndarmál í 2012 í mun til barnatalið**

| | Barnaverndarøki | Gentur | Dreingir | Tilsamans | Barnatal | Mál í % av barnatali |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | BVT, Tórshavn | 59 | 51 | 110 | 6.265 | 1,8 |
| 2 | BVT, Norðoyggjar | 14 | 21 | 35 | 1.666 | 2,1 |
| 3 | BVT, Skálafjørðurin | 15 | 15 | 30 | 1.816 | 1,7 |
| 4 | BVT, Fuglafjørður | 5 | 4 | 9 | 444 | 2,0 |
| 5 | BVT, Sunda kommuna | 5 | 8 | 13 | 782 | 1,7 |
| 6 | BVT, Sandavágur | 27 | 17 | 44 | 1.462 | 3,0 |
| 7 | BVT, Sandoy | 2 | 3 | 5 | 353 | 1,4 |
| 8 | BVT, Suðuroy | 3 | 6 | 9 | 790 | 1,1 |
| 9 | BVT, Eysturkommuna | 3 | 9 | 12 | 628 | 1,9 |
| 10 | BVT, Suðuroyar sunnara | 4 | 3 | 7 | 469 | 1,5 |
| **Alt landið** | | **137** | **137** | **274** | **14.675** | **1,9** |

Talva 5 vísir, hvussu nógv nýggj barnaverndarmál eru skrásett í økjunum í 2012. Tilsamans eru skrásett 274 nýggj mál í árinum – 137 dreingir og 137 gentur. Samlaða talið av nýggjum málum í mun til barnatalið í øllum landinum var 1,9%.

Norðoyggjar (2,1%), Fuglafjørður (2,0%) og Sandavágur (3,0%) hava lutfalsliga fleiri nýggj barnaverndarmál enn galdandi er fyri alt landið. Eysturkommuna hevur neyvt sama lutfall millum nýggj mál og barnatal sum alt landið, nevnliga 1,9%. Hini seks økini hava færri nýggj mál enn landið sum heild.

**Talva 6: Endað mál 2012**

| | Barnaverndarøki | Gentur | Dreingir | Tilsamans | Barnatal | Mál í % av barnatali |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | BVT, Tórshavn | 27 | 23 | 50 | 6.265 | 0,8 |
| 2 | BVT, Norðoyggjar | 31 | 26 | 57 | 1.666 | 3,4 |
| 3 | BVT, Skálafjørðurin | 15 | 15 | 30 | 1.816 | 1,7 |
| 4 | BVT, Fuglafjørður | 1 | 2 | 3 | 444 | 0,7 |
| 5 | BVT, Sunda kommuna | 3 | 3 | 6 | 782 | 0,8 |
| 6 | BVT, Sandavágur | 18 | 11 | 29 | 1.462 | 2,0 |
| 7 | BVT, Sandoy | | 6 | 6 | 353 | 1,7 |
| 8 | BVT, Suðuroy | 3 | 5 | 8 | 790 | 1,0 |
| 9 | BVT, Eysturkommuna | 1 | 0 | 1 | 628 | 0,2 |
| 10 | BVT, Suðuroyar sunnara | 3 | 5 | 8 | 469 | 1,7 |
| **Alt landið** | | **102** | **96** | **198** | **14.675** | **1,3** |

Talva 6 vísir, hvussu nógv mál eru endað í 2012. Fyri alt landið vórðu 198 barnaverndarmál endað í 2012, harav 102 vóru gentur og 96 vóru dreingir.

**Talva 7: Hvør fráboðar 2012**

| Fráboðari | Íalt | %-býti |
|---|---|---|
| Foreldramyndugleikin | 49 | 19,1 |
| Heilsusystir | 37 | 14,4 |
| Skúli | 29 | 11,3 |
| Annað barnaverndarøki | 24 | 9,3 |
| Onnur | 18 | 7,0 |
| Familja ella onnur sum kenna familjuna | 17 | 6,6 |
| Løgreglan | 16 | 6,2 |
| Psykiatriski depilin | 15 | 5,8 |
| Barnaverndartænastan tekur málið upp sjálv | 14 | 5,4 |
| Dagstovnar og dagrøkt | 13 | 5,1 |
| Ljósmóður | 7 | 2,7 |
| Kommunulækni | 5 | 1,9 |
| Onnur í Heilsuverkinum | 5 | 1,9 |
| Almannastovan | 4 | 1,6 |
| Foreldur uttan foreldramyndugleika | 3 | 1,2 |
| Frítíðarskúli | 1 | 0,4 |
| **Tilsamans** | **257** | **100,0** |

GG: Til ber at skráseta meiri enn ein fráboðara fyri hvørt mál.

Á talvu 6 sæst, at 19,1% av teimum, sum fráboða eitt barnaverndarmál eru tey, sum hava foreldramyndugleikan av barninum. Foreldramyndugleikin er sostatt størsti einstaki bólkur av fráboðarum. Leggja vit afturat foreldur uttan foreldramyndugleika (1,2%) og familju og onnur sum kenna familjuna (6,6%), sæst, at meiri enn fjórðingurin (26,9%) av øllum fráboðanum koma úr privata umhvørvinum hjá barninum.

Hin parturin (73,1%) av fráboðanum kemur frá yrkisliga umhvørvinum, sum barnið beinleiðis ella óbeinleiðis kemur í samband við. Tann yrkisbólkurin, sum fráboðar oftast eru heilsufrøðingar, ið standa fyri 14,4% av øllum fráboðanum.

Í mun til árið frammanundan eru lutfalsliga færri fráboðanir frá foreldramyndugleikanum skrásettar og er hetta fyri ein part grundað á broyttar mannagongdir í sambandi við skráseting. Í 2012 er foreldramyndugleikin ikki skrásettur sum fráboðari, um hesin fráboðar saman við yrkisligum fráboðara, sum t.d. heilsusystir. Ein onnur grund til lutfalsliga færri fráboðanir frá foreldramyndugleikanum er, at fleiri yrkisligar fráboðanir eru skrásettar í 2012 í mun til 2011.

Ein partur av fráboðarunum ynskja at vera ónevndir sambært BVL § 14, stk. 2. Í 2012 ynsktu 26 fráboðarir at vera ónevndir. Hetta er ein øking í mun til 2011, tá ið talið á ónevndum fráboðarum var 16.

**Barnið sum offur og hættislig atferð hjá barni**

Skeivleikar sum gera um seg í barnaumsorgan og uppaling kunnu verða býttir í tveir flokkar: harðskap og vanrøkt. Við harðskap verður meint við gjørda gerð, sum kann skaða ella sannlíkt skaðar menninginga hjá barninum. Við vanrøkt verður meint við ógjørda gerð, sum kann skaða ella sannlíkt skaðar menningina hjá barninum.

## Talva 8: Hvørjar vóru orsøkirnar til fráboðanirnar í 2012

| | |
|---|---|
| **Vanrøkt** | |
| Kenslulig/sálarlig vanrøkt | 153 |
| Vanrøkt í sambandi við umsjón og eftirlit | 67 |
| Vanrøkt í sambandi við skúlagongd | 21 |
| Likamlig vanrøkt | 5 |
| Tilsamans | 246 |
| **Harðskapur** | |
| Kensluligur/sálarligur harðskapur | 30 |
| Likamligur harðskapur | 10 |
| Kynsligur harðskapur (ágangur) | 8 |
| Tilsamans | 48 |
| **Heilsa ella lív hjá ófødda barninum í vanda, § 14, stk. 3** | |
| Heilsa ella lív hjá ófødda barninum í vanda, § 14, stk. 3 | 5 |
| Tilsamans | 5 |
| **Hættislig atferð hjá barninum** | |
| Barnið hevur trupulleikar í skúlanum og vanrøkir skúlan | 28 |
| Barnið setur egna heilsu og menning í vanda | 15 |
| Misgerðir hjá barni, t.d kemur ikki til hús ásetta | 6 |
| Barnið fremur likamligan ella kynsligan harðskap m | 5 |
| Barnið nýtir rúsevir/rúsdrekka | 4 |
| Tilsamans | 58 |
| | |
| **Orsøkir til fráboðanir tilsamans** | **357** |

GG: Til ber at skráseta meiri enn eina orsøk til fráboðan fyri hvørt mál.

Sambært § 44, stk. 1 skal eitt barn kunnast og hoyrast, um tess menning og búning loyvir tí, og um tað verður mett at vera til frama fyri barnið.

Í 2012 eru skrásett hesi svar til spurningin "Varð tosað við barnið í sambandi við at málið varð kannað, sambært § 44, stk. 1:

## Talva 9: Kunning og hoyring av barni, § 44

| Svar | Tal | %-býti |
|---|---|---|
| Nei | 56 | 51,9 |
| Ja | 52 | 48,1 |
| **Íalt** | **108** | **100,0** |

Sum talvan vísir, varð tosað við barnið í færri enn helmingin av málunum.

# 3. Fígging – kostnaður av barnavernd

Áðrenn barnaverndarlógin kom í gildi, var tað sambært barnaforsorgarlógini, barnaverndarnevndirnar, sum tóku avgerð í barnverndarmálum, meðan landið rindaði útreiðslurnar av málunum. Eitt av endamálunum við lógini var, at fáa greitt fíggjarligt ábyrgdarbýti millum land og kommunur á barnaverndarøkinum. Lógin ásetur tí, at kommunurnar bera kostnaðin av tí fyribyrgjandi partinum av barnverndarøkinum, og tá børn verða sett til fosturs, meðan landið ber útreiðslurnar, tá børn verða umsorgnaryvirtikin og fara á viðgerðarstovn, men kommunurnar gjalda brúkaragjald.

**Talva 10: Kostnaður av barnaverndarøkinum pr. íbúgva, 2012**

| Barnaverndarøki | Fólkatal | Kostnaður | Kostnaður pr. íbúgva (kr.) |
|---|---|---|---|
| BVT, Tórshavn | 19.842 | 21.738.574 | 1.096 |
| BVT, Norðoyggjar | 5.682 | 5.804.405 | 1.022 |
| BVT, Skálafjørðurin | 5.900 | 3.948.238 | 669 |
| BVT, Fuglafjørður | 1.515 | 1.622.773 | 1.071 |
| BVT, Sunda kommuna | 2.466 | 1.318.365 | 535 |
| BVT, Sandavágur | 4.865 | 4.403.729 | 905 |
| BVT, Sandoy | 1.319 | 1.300.655 | 986 |
| BVT, Suðuroy | 2.984 | 3.399.330 | 1.139 |
| BVT, Eysturkommuna | 1.975 | 1.589.877 | 805 |
| BVT, Suðuroyar sunnara | 1.696 | 1.575.533 | 929 |
| **Alt landið** | **48.244** | **46.701.478** | **968** |

Í 2012 kostaði barnarverndarøkið 46,7 mió. kr. tilsamans fyri allar kommunalu barnaverndartænasturnar.

Kostnaðurin pr. íbúgva var í miðal fyri landið kr. 968. Norðoyggjar, Sandavágur, Sandoy og Suðuroyar sunnara BVT hava á leið sama kostnað av barnaverndarøkinum pr. íbúgva sum landsmiðaltalið. Tórshavn, Fuglafjørður og Suðuroy liggja omanfyri landsmiðaltalið í kostnaði. BVT við Skálafjørðin, í Sunda kommunu og Eysturkommunu lógu undir landsmiðaltalinum.

Mestan kostnað fyri hvønn íbúgva hevði BVT, Suðuroy (1.139 kr.) meðan BVT í Sunda kommunu hevði lægstan kostnað fyri hvønn íbúgva (535 kr.).

**Talva 11: Kostnaður av barnaverndarøkinum pr. mál, 2012**

| Barnaverndarøki | Tal av málum | Kostnaður | Kost. Pr. mál (kr.) |
|---|---|---|---|
| BVT, Tórshavn | 343 | 21.738.574 | 63.378 |
| BVT, Norðoyggjar | 108 | 5.804.405 | 53.744 |
| BVT, Skálafjørðurin | 88 | 3.948.238 | 44.866 |
| BVT, Fuglafjørður | 32 | 1.622.773 | 50.712 |
| BVT, Sunda kommuna | 45 | 1.318.365 | 29.297 |
| BVT, Sandavágur | 90 | 4.403.729 | 48.930 |
| BVT, Sandoy | 19 | 1.300.655 | 68.456 |
| BVT, Suðuroy | 55 | 3.399.330 | 61.806 |
| BVT, Eysturkommuna | 38 | 1.589.877 | 41.839 |
| BVT, Suðuroyar sunnara | 28 | 1.575.533 | 56.269 |
| **Alt landið** | **846** | **46.701.478** | **55.203** |

Talva 11 vísir, hvussu nógv hvørt barnaverndarmál kostar í miðal. Fyri landið alt kostar hvørt barnaverndarmál sambært talvuni 55.203 kr. í miðal. Í Norðoyggjum og Suðuroyar sunnaru barnaverndartænastu er kostnaðurin fyri hvørt mál á hædd við landsmiðaltalið.

Við Skálafjørðin, í Fuglafirði, Sunda kommunu, Sandavági og Eysturkommunu er kostnaðurin pr. mál lægri enn landsmiðaltalið, meðan hann er hægri í BVT, Tórshavn, Sandoy og Suðuroy.

Kostnaðurin av barnaverndartænastuni pr. mál er mestur í Sandoynni, har hann er meiri enn tvífalt so høgur sum í Sunda kommunu, har barnaverndartænastan kostar minst pr. mál.

**Talva 12: Kostnaður av barnaverndarøkinum, býtt á nýtslu, tús. kr. 2012**

| Barnaverndarøki | | Fosturforeldra-skipanin | Fyrisiting | § 15 fyriskipanir | Stovnsútreiðslur | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | BVT, Tórshavn | 10.798.502 | 4.187.196 | 4.505.451 | 2.247.425 | 21.738.574 |
| 2 | BVT, Norðoyggjar | 1.375.724 | 2.457.361 | 1.339.072 | 632.247 | 5.804.404 |
| 3 | BVT, Skálafjørðurin | 487.185 | 1.288.704 | 1.549.624 | 622.725 | 3.948.238 |
| 4 | BVT, Fuglafjørður | 567.773 | 592.118 | 298.089 | 164.792 | 1.622.773 |
| 5 | BVT, Sunda kommuna | 189.476 | 651.260 | 364.703 | 112.926 | 1.318.365 |
| 6 | BVT, Sandavágur | 1.399.338 | 1.329.341 | 1.079.066 | 595.983 | 4.403.729 |
| 7 | BVT, Sandoy | 333.866 | 455.265 | 463.932 | 47.592 | 1.300.655 |
| 8 | BVT, Suðuroy | 1.500.617 | 870.602 | 901.444 | 126.667 | 3.399.330 |
| 9 | BVT, Eysturkommuna | 355.481 | 649.572 | 573.766 | 11.058 | 1.589.877 |
| 10 | BVT, Suðuroyar sunnara | 475.121 | 668.814 | 431.598 | | 1.575.533 |
| **Alt landið 2012** | | **17.483.082** | **13.150.234** | **11.506.746** | **4.561.416** | **46.701.478** |
| **Alt landið 2012 %-býti** | | **37,4** | **28,2** | **24,6** | **9,8** | **100,0** |
| Alt landið 2011 | | 16.324.226 | 15.218.616 | 8.479.744 | 5.761.663 | 45.784.249 |
| Alt landið 2011 %-býti | | 35,7 | 33,2 | 18,5 | 12,6 | 100,0 |

Talva 12 vísir kostnaðin av barnaverndarøkinum, býtt á nýtslu. Samlaða nýtslan í økinum var 46,7 mill. kr. í 2012, sum svarar til ein vøkstur á 2,0 % í mun til 2011.

Í 2012 var størri partur av kostnaðinum nýttur til fosturforeldraskipanina og § 15 fyriskipanir í mun til 2011. Tilsvarandi var minni nýtt til fyrisiting og stovnsútreiðslur.

Fyrisitingarkostnaður fevnir um:

- kostnað fyri starvsfólk í barnaverndartænastunum,
- samsýning til barnaverndarnevndirnar og
- kostnað av rakstrinum av Barnaverndarstovu Føroya.

Í summum økjum eru harumframt íroknaðir sálarfrøðingar í fyrisitingarkostnaðin, tá ið hesir eru í starvi hjá kommununi.

**Talva 13: Stovnsútreiðslur 2012**

| Útreiðsluslag | 2012 Upphædd (kr.) | 2012 %-býti | 2011 Upphædd (kr.) | 2011 %-býti |
|---|---|---|---|---|
| Brúkaragjald til bú-og viðgerðarstovnar í Føroyum | 3.859.260 | 84,6 | 3.044.194 | 52,8 |
| Eftirskúlar uttanlands | 413.813 | 9,1 | 1.826.206 | 31,7 |
| Skúlagongd í Føroyum | 23.365 | 0,5 | 27.400 | 0,5 |
| Brúkaragjald til bú-og viðgerðarstovnar uttanlands | 211.690 | 4,6 | 812.274 | 14,1 |
| Útreiðslur í sambandi við samveru | 53.288 | 1,2 | 51.588 | 0,9 |
| **Tilsamans** | **4.561.416** | **100,0** | **5.761.663** | **100,0** |

Sambært talvu 13 eru stovnsútreiðslurnar lækkaðar í 2012 í mun til 2011 við einum fimtingi. Minkingin stavar frá minni nýtslu til eftirskúlar, bú- og viðgerðarstovnar uttanlands. Harafturímóti er brúkaragjald til bú- og viðgerðarstovnar í Føroyum hækkað munandi.

Kostnaðurin at senda børn á viðgerðarstovn er ein landsútreiðsla, men barnaverndartænasturnar rinda eitt brúkaragjald, sum Almannamálaráðið, sambært kunngerð, ásetur árliga.

**Talva 14: Fosturforeldraskipanin. Kostnaður 2012**

| Útreiðsluslag | Upphædd (kr.) | %-býti |
|---|---|---|
| Samsýning til fostur/umlættingarforeldur | 15.821.598 | 86,2 |
| Vistarhald/klædir | 1.559.586 | 8,5 |
| Stovnsgjald aðrar kommunur | 688.558 | 3,8 |
| Lummapeningur til barnið | 215.623 | 1,2 |
| Stovnan og útbúnaður | 64.026 | 0,3 |
| Ráðgeving til fosturforeldur | 6.250 | 0,0 |
| **Tilsamans** | **18.355.641** | **100,0** |

Nógv tann størsti parturin (86,2%) av útreiðslunum til Fosturforeldraskipanina er samsýning til fosturforeldur. Støddin á samsýningini til fosturforeldur verður ásett í kunngerð frá Almannamálaráðnum og við atliti til, hvussu krevjandi uppgávan er. Her verður millum annað tikin hædd fyri aldri á barni, og um møguligt er, at hava annað arbeiði eisini.

Tað er Fosturforeldraskipanin hjá Barnaverndarstovuni, sum veitir fosturforeldrum ráðgeving. Hetta verður gjørt við regluliga at skipa fyri fakligum skeiðum og útbúgving til fosturforeldur. Fosturforeldraskipanin hevur eisini fastar supervisjónsbólkar fyri fosturforeldur. Harumframt er møguleiki at fáa ráðgeving og supervisjón hjá sálarfrøðingi og familjuráðgeva á Barnaverndarstovuni eftir tørvi.

**Talva 15: BVL § 15 - fyribyrgjandi fyriskipanir. Kostnaður 2012**

| Útreiðsluslag | Upphædd (kr.) | %-býti |
|---|---|---|
| Familjuviðg. ella líknandi stuðul | 3.056.115 | 28,7 |
| Stuðul í heiminum | 2.788.774 | 26,2 |
| Sálarfrøðilig hjálp | 2.445.987 | 23,0 |
| Sosialt ansingarpláss | 942.169 | 8,9 |
| Persónl.ráðgevi/stuðul til barnið | 706.561 | 6,6 |
| Arbeiðsroynd ella líknandi | 406.473 | 3,8 |
| Sjúku-/ ella misnýtsluviðgerð | 130.087 | 1,2 |
| Menna frítíðarvirks. hjá barninum | 90.835 | 0,9 |
| Stuðul í egnum kamari/íbúð | 67.187 | 0,6 |
| **Tilsamans** | **10.634.186** | **100,0** |

Talvan vísir, at størstu útreiðslupostarnir eru til familjuviðgerð, stuðul í heiminum og sálarfrøðiliga hjálp. Hesar tríggjar fyriskipanir sambært § 15 í barnaverndarlógini standa tilsamans fyri 78,0% av útreiðslunum, sum verða latnar eftir greinini. Møguleikarnir at veita børnum og familjum hjálp eftir barnaverndarlógini eru nógvir. Á talvuni sæst yvirlit yvir ymiskar fyriskipanir. Høvuðsreglan er, at so leingi tað gagnar barninum, so er grundarlag fyri eini fyriskipan.

Fyribyrgjandi fyriskipanirnar sambært § 15 í barnaverndarlógini eru største parturin av barnaverndar arbeiðinum. Einans, tá ikki er møguligt við fyribyrgjandi fyriskipanunum at geva einum barni ella familju nøktandi hjálp, kann verða farið víðari til aðrar og meira víðgongdar fyriskipanir. Slíkar fyriskipanir kunnu m.a. verða at seta barnið heiman í fosturheim ella á stovn. Flestu avgerðir, um at flyta barnið úr heiminum, verða tiknar við samtykki frá foreldrunum. Hóast samtykki er fingið til vega, skal málið leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til støðutakan. Hetta er fyrst og fremst orsakað av, at tað við nýggju barnaverndarlógini var mett neyðugt at styrkja rættartrygdina hjá børnum og foreldrum.

# 4. Fosturforeldraskipanin

Kommunurnar stovnsettu eina fosturforeldraskipan fyri alt landið, tá tær settu Barnaverndarstovu Føroya á stovn í 2006. Fosturforeldraskipanin er ein týðandi partur av virkseminum á Barnaverndarstovuni.

Tá umstøðurnar í heiminum eru soleiðis, at tað ikki ber til hjá einum barni at verða búgvandi heima, verður kannað, um barnið kann setast í eina fosturfamilju. Atlit skulu fyrst takast til, um næstrarfólk kunnu góðkennast sum fosturfamilja.

Eitt fosturheim sambært barnaverndarlógini er at skilja, tá ið eitt barn verður sett heiman í eitt annað heim, har fosturforeldur hava umsorgan fyri tí í styttri ella longri tíðarskeið. Talan kann m.a. vera um umlætting, bráðfeingis fosturheim, og fosturheim, har børn verða sett fyribils ella varandi til fosturs.

Eitt barn kann setast til fosturs, tá ið:

1) foreldrini samtykkja, at barnið verður sett í fosturheim,
2) barnið ongan verja hevur,
3) barnið fyribils er undir barnaverndarnevndarinnar umsorgan uttan foreldranna samtykki.

Barnaverndarstova Føroya, Fosturforeldraskipanin, fær frá barnaverndartænastunum upplýsingar um barnið, og hvønn tørv barnið hevur, og skal so finna ta røttu familjuna til barnið.

Fosturforeldraskipanin hevur í løtuni 88 fosturfamiljur, sum eru góðkendar, og sum hava børn til fosturs, ella eru tilreiðar at taka ímóti børnum til fosturs ella umlætting.

Umráðandi er at finna eina familju, sum hóskar best til tað einstaka barnið

Fosturforeldraskipanin hevur tí fleiri fosturfamiljur í skipanini, sum enn ikki hava børn. Tað kunnu vera ymisk viðurskifti, sum gera, at tað einstaka barnið ikki hóskar til hesar fosturfamiljur.

Eisini eru fleiri fosturfamiljur, sum verða nýttar til fleiri fyriskipanir. Til dømis, tá talan er um systkin, ella tá tað snýr seg um umlættingarfamiljur, sum hava fleiri børn í styttri tíðarskeið í senn.

Í 2012 komu 19 nýggjar umsóknir inn til Fosturforeldraskipanina og allar vórðu góðkendar. Av hesum vóru 11 úr netverkinum hjá barninum.

**Talva 16: Tal av børnum til fosturs 31. desember 2012 – býtt eftir aldri**

| Barnaverndarøki | 0-6 | 7-13 | 14-18 | 19-21 | Íalt | Herav netverk |
|---|---|---|---|---|---|---|
| BVT, Tórshavn | 9 | 18 | 11 | | 38 | 7 |
| BVT, Norðoyggjar | 3 | 2 | | | 5 | |
| BVT, Skálafjørðurin | | | 2 | | 2 | |
| BVT, Fuglafjørður | | 1 | 2 | | 3 | |
| BVT, Sunda kommuna | | 1 | | | 1 | 1 |
| BVT, Sandavágur | 3 | 1 | 6 | | 10 | 6 |
| BVT, Sandoy | | 1 | | 1 | 2 | |
| BVT, Suðuroy | 4 | 1 | | 1 | 6 | 1 |
| BVT, Eysturkommuna | 1 | | | | 1 | |
| **Alt landið** | **20** | **25** | **21** | **2** | **68** | **15** |

Tilsamans 68 børn vóru til fosturs í Føroyum við árslok 2012. Av hesum vóru bróðurparturin í Tórshavnar kommunu. 15 av fosturbørnunum, svarandi til gott og væl fimta hvørt fosturbarn, vóru til fosturs hjá fólki, sum eru í familju við barnið ella á annan hátt partur av netverkinum hjá barninum.

**Talva 17: Tal av børnum til fosturs 31. desember 2012 - býtt eftir aldri og kyni**

| Aldur | 0-6 | | 7-13 | | 14-18 | | 19-21 | | Íalt | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Barnaverndarøki** | **M** | **K** | **M** | **K** | **M** | **K** | **M** | **K** | **M** | **K** | **Íalt** |
| BVT, Tórshavn | 8 | 1 | 14 | 4 | 4 | 7 | | | 26 | 12 | 38 |
| BVT, Norðoyggjar | 1 | 2 | 1 | 1 | | | | | 2 | 3 | 5 |
| BVT, Skálafjørðurin | | | | | | 2 | | | 0 | 2 | 2 |
| BVT, Fuglafjørður | | | | 1 | 2 | | | | 2 | 1 | 3 |
| BVT, Sunda kommuna | | | | 1 | | | | | 0 | 1 | 1 |
| BVT, Sandavágur | | 3 | 1 | | 2 | 4 | | | 3 | 7 | 10 |
| BVT, Sandoy | | | | 1 | | | 1 | | 1 | 1 | 2 |
| BVT, Suðuroy | 2 | 2 | 1 | | | | | 1 | 3 | 3 | 6 |
| BVT, Eysturkommuna | | 1 | | | | | | | 0 | 1 | 1 |
| BVT, Suðuroyar sunnara | | | | | | | | | 0 | 0 | 0 |
| **Alt landið** | **11** | **9** | **17** | **8** | **8** | **13** | **1** | **1** | **37** | **31** | **68** |

Býtið millum dreingir og gentur, sum eru sett til fosturs við árslok 2012, vísir eina yvirvág av dreingjum fyri alt landið, nevnliga 37 dreingir og 31 gentur. Kynsbýtið í aldursbólkunum vísir, at fleiri dreingir enn gentur eru til fosturs í teimum báðum yngstu aldursbólkunum, meðan fleiri gentur enn dreingir eru í aldursbólkinum 14 - 18 ár.

**Talva 18: Tal av børnum til umlætting 31. desember 2012 – býtt eftir aldri**

| Barnaverndarøki | 0-6 | 7-13 | 14-18 | 19-21 | Íalt | Herav netverk |
|---|---|---|---|---|---|---|
| BVT, Tórshavn | 3 | 17 | 5 | | 25 | 6 |
| BVT, Norðoyggjar | 3 | 1 | | | 4 | |
| BVT, Skálafjørðurin | 1 | 3 | | | 4 | 2 |
| BVT, Sunda kommuna | 1 | 3 | | | 4 | 3 |
| BVT, Sandavágur | 1 | 5 | 2 | | 8 | 4 |
| BVT, Suðuroy | 1 | 2 | 1 | | 4 | |
| BVT, Eysturkommuna | 2 | | | | 2 | |
| BVT, Suðuroyar sunnara | | | 1 | | 1 | |
| **Alt landið** | **12** | **31** | **9** | **0** | **52** | **15** |

Talva 18 vísir hvussu nógv børn vóru til umlætting við árslok 2012. Tilsamans 52 børn vóru til umlætting og fleiri enn helvtin av hesum vóru í aldursbólkinum 7 til 13 ár. Gott og væl fjórða hvørt barn til umlætting er hjá næstringum og øðrum, sum standa barninum nær.

Tá ið viðurskiftini í heiminum ella hjá barninum eru soleiðis, at ikki er neyðugt at seta tey til fosturs, men kortini hava tørv á umlætting, kunnu børnini koma í eina fosturfamilju til umlætting. Hetta merkir, at tey í styttri tíðarskeið búgva hjá fosturfamiljuni, men eru ikki umsorganaryvirtikin, og foreldrini hava framvegis foreldramyndugleikan og ábyrgdina av børnunum.

Mest vanliga er, at børnini eru eitt ella tvey vikuskifti um mánaðin til umlætting, men talan kann eisini verða um eitt ávíst tíðarskeið, meðan foreldrini eitt nú fáa viðgerð fyri misnýtslu og líknandi.

Ætlanin við umlætting er, at geva børnum og foreldrum nýggja orku. Koma børnini frá eini familju, sum ikki er so vælvirkandi á øllum økjum, kunnu tey síggja og kenna seg sum part av eini vælvirkandi familju, sum kann geva teimun umsorgan og upplivingar.

Tað kann vera trupult at finna fosturfamiljur til umlættingarfyriskipanir. Hetta er eitt orku- og tíðarkrevjandi arbeiði fyri fosturforeldraskipanina. Tað, at finna eina fosturfamilju til eitt barn, sum skal í umlætting, kann ofta viðføra, at fosturforeldraskipanin skal vitja fleiri fosturfamiljur, áðrenn rætta fosturfamiljan verður funnin.

Umlætting er ein sjálvboðin fyribyrgjandi fyriskipan, skilt á tann hátt, at barnið ella familjan kann broyta meining eftir, at fosturfamiljan er funnin og ikki ynskja umlætting kortini. Møguligt er ikki at seta í verk umlætting uttan samtykki frá tí foreldrinum, sum hevur foreldramyndugleikan.

**Talva 19: Tal av børnum til umlætting 31. desember 2012 – býtt eftir aldri og kyni**

| Aldur | 0-6 | | 7-13 | | 14-18 | | 19-21 | | Íalt | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Barnaverndarøki** | **M** | **K** | **M** | **K** | **M** | **K** | **M** | **K** | **M** | **K** | **Íalt** |
| BVT, Tórshavn | 2 | 1 | 11 | 6 | 2 | 3 | | | 15 | 10 | 25 |
| BVT, Norðoyggjar | 1 | 2 | 1 | | | | | | 2 | 2 | 4 |
| BVT, Skálafjørðurin | | 1 | 2 | 1 | | | | | 2 | 2 | 4 |
| BVT, Sunda kommuna | | 1 | 2 | 1 | | | | | 2 | 2 | 4 |
| BVT, Sandavágur | | 1 | 1 | 4 | 1 | 1 | | | 2 | 6 | 8 |
| BVT, Suðuroy | | 1 | 1 | 1 | 1 | | | | 2 | 2 | 4 |
| BVT Eysturkommuna | 1 | 1 | | | | | | | 1 | 1 | 2 |
| BVT, Suðuroyar sunnara | | | | | | 1 | | | 0 | 1 | 1 |
| **Alt landið** | **4** | **8** | **18** | **13** | **4** | **5** | **0** | **0** | **26** | **26** | **52** |

Fyriskipanin umlætting verður mest nýtt til aldursbólkin 7 - 13 ára gomul. Um ársskiftið 2012/2013 vóru eins nógvir dreingir og gentur til umlætting. Tórshavnar barnaverndartænasta hevur nógv flest børn í umlætting. Annað hvørt barn í umlætting var í Tórshavnar kommunu um ársskiftið 2011/2012.

# 6. Mannagongd og bakgrund

Tann 1. januar 2006 kom nýggja barnaverndarlógin í gildi, og við henni varð Barnaverndarstova Føroya sett á stovn. Uppgávan hjá Barnaverndarstovu Føroya er m.a.:

- at umsita fosturforeldraskipanina
- at veita barnaverndartænastum holla vegleiðing og ráðgeving
- at virka sum ráðgevi hjá landsstýriskvinnuni á barnaverndarøkinum
- at styrkja og samskipa barnaverndarøkið
- og at fáa til vega hagtøl og skipa fyri gransking og menning av økinum.

Síðan Barnaverndarstova Føroya varð sett á stovn, hevur verið arbeitt miðvíst við at fáa til vega hagtalstilfar. Byrjað var við fyrst at savna inn tilfar manuelt frá øllum barnaverndartænastunum í landinum. Barnaverndarstova Føroya hevur síðan, í tøttum samstarvi við barnaverndartænasturnar, ment eina elektroniska hagtalsskipan, sum tølini í hesi frágreiðing eru tikin úr.

Barnaverndartænasturnar inntøppa í hagtalsskipanina upplýsingar um tey barnaverndarmál, tey hava, m.a. hvørjar fyriskipanir verða settar í verk, hvørjir trupulleikar eru, og hvør kostnaðurin í tí einstaka barnaverndarmálinum er. Í hagtalsskipanina verða teir upplýsingarnir inntøppaðir, sum barnaverndartænasturnar saman við Barnaverndarstovu Føroya hava mett vera av týdningi fyri at fáa innlit í barnaverndarøkið í Føroyum. Í hagtalsskipanini eru nógv fleiri upplýsingar inntøppaðir enn henda frágreiðing leggur fram.

Tá talan er um barnaverndarmál, er talan um sera privatar og viðkvæmar upplýsingar, umframt revsiverd viðurskifti. Dátueftirlitið hevur, við heimild í § 35, stk. 1, smb. § 9, stk. 1 og § 10, stk.1 í persónsupplýsingarlógini, givið loyvi til, at Barnaverndarstova Føroya kann viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar í tilknýti til hagtalsskipanina hjá Barnaverndarstovuni. Loyvið til viðgerðina av persónsupplýsingum, er treytað av, at ásetingarnar í løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, við seinni gjørdum broytingum, og kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í samband við persónsupplýsingar, verða hildnar.

**Endamál**

Endamálið við hagtalsskipanini er at betra um grundarlagið fyri avgerðum á barnaverndarøkinum.

Umframt hetta, hevur hagtalsskipanin eisini til endamáls at geva leiðslunum, ið vara av barnaverndarøkinum í Føroyum eina mynd av støðuni í einstøku barnaverndartænastunum við atliti til menning og betran. Upplýsingarnar í hagtalsskipanini kunnu eisini nýtast sum grundarlag hjá kommununum, tá tær leggja til rættis kommunalpolitikkin.

Tá barnaverndarlógin varð sett í gildi 1. januar 2006, fingu allar barnaverndartænastur í landinum skyldu at lata upplýsingar um barnaverndarmál til Barnaverndarstovu Føroya. Barnaverndarstovan hevur ábyrgdina av hagtalsskipanini og hevur saman við KT-tænastuni hjá Tórshavnar kommunu sett upp eina trygga KT-skipan. Tann barnaverndartænastan, sum hevur eitt barnaverndarmál, hevur skyldu til at skráseta málið og tær hendingar, sum eru í málinum til Barnaverndarstovu Føroya. Til allar skrásetingar verður P-talið hjá barninum nýtt. Umframt at skráseta viðurskifti hjá barninum, verða eisini skrásettar upplýsingar um tann, ið hevur foreldramyndugleikan yvir barninum.

**Trygd**

Nógv verður gjørt burturúr, at hagtalsskipanin hjá Barnaverndarstovu Føroya skal vera so trygg sum møguligt fyri at tryggja, at skrásettu upplýsingarnar ikki koma óviðkomandi í hendi. Upplýsingarnar í hagtalsskipanini kunnu einans nýtast til hagtals- og vísindalig endamál.

Hagtalsskipanin er m.a. tryggjað við einari trygdarváttan og eini kryptering í sambandi við ta elektronisku flytanina av data. Harumframt er dataviðgerðin fevnd av tekniskum og umsitingarligum trygdarkrøvum, soleiðis, at hvørt einstakt starvsfólk, sum arbeiðir við hagtalsskipanini, hevur fleiri persónligar kotur til skipanina. Skrásett verður eisini, hvør er inni á skipanini og nær, og hvat skipanin verður nýtt til. Somuleiðis er stórur dentur lagdur á, at eisini starvsfólkini í einstøku barnaverndartænastunum vísa umhugsni og ansni í sambandi við hagtalsarbeiðið.

**Óvissur**

Barnaverndartænasturnar í landinum byrjaðu at inntøppa í hagtalsskipanina hjá Barnaverndarstovu Føroya í 2008. Av tí, at neyðugt var við eini royndartíð og upplæring fyri at tryggja, at skrásetingarnar verða gjørdar á sama hátt í øllum barnaverndartænastunum, varð ikki ráðiligt at almannakunngera hagtøl úr skipanini í 2008. 2009 var fyrsta árið, at Barnaverndarstova Føroya nýtti upplýsingar úr elektronisku hagtalsskipanini. Sjálvt um hugt hevur verið gjølla eftir, at upplýsingar í skipanini eru rætt inntøppaðir, kann full vissa ikki gevast fyri, at ongin feilir eru í upplýsingunum. Fyri at tryggja, at upplýsingarnar í hesi frágreiðing eru rættar, er hendan frágreiðing send øllum barnaverndartænastunum til ummælis, gjøgnumgongd og góðkenning, áðrenn hon er almannakunngjørd.

Barnaverdarstova Føroya juli 2013

Oddbjørg Balle, leiðari